## DAGSINS MEINING

# Nýtt ár - valár

Rætt er við nýggjársleitið at meta um politisku úrslitini og útlitini. Val verður um stutta tíð. Samgongan hevur havt lætt spæl við methøgum fiskaprísum. Tí fara bakkøst, ið liggja og lúra at seta stór krøv til komandi løgting. Vinnuliga hevur gingið væl við methøgaum inntøkum og arbeiði til allar hendur. Men so er eisini alt sagt. Á nógvum økjum hevur útviklingurin ikki fylgt við, eitt nú á pensiónsøkinum. Um somu tíð sum samgongan hevur vent teimum veikastu bakið hevur hon við eitt høgg skorið nærum 400 mill. kr. av blokkinum. Tað og vánaliga stevið í samgongu fara at merkja valstríðið. Lagt verður upp til stjórnarskifti í Føroyum. Spurningurin er, hvør tekur við.

Einki er avgjørt fyrr enn veljarin hevur talað. Polariseringin, ið vit sóu til fólkatingsvalið tænir ikki framtíðar menningini í Føroyum. Hon bara styrkir ósemjuna og viðgongdu sjónarmiðini. Tað hava vit ikki brúk fyri. Vit hava brúk fyri politikarum,ið kunnu reka konsensuspolitikk og røkka realistiskum semjum. Tíðin eigur at verða farin frá at síggja alt sum antin svart ella hvítt.

Givið er at andstøðan kemur at mynda nýggja landsstýrið so ella so. Og her er okkara boð, at størsti andstøðuflokkurin, Javnaðarflokkurin kemur at standa á odda fyri komandi landsstýri, tí hann vil semju við aðrar flokkar tvs. konstruktivan konsensuspolitikk.

Javnaðarfl. og Sambandsfl. kunnu fáa meiriluta einsamallir, men tað kunnu Javnaðarfl. og Tjóðveldisfl. eisini. Kemur flokkurin í ta lyklastøðu, at hann kann velja, hvønn hann vil samstarva við, er sumt, sum togar móti Sambandinum og sumt móti Tjóðveldinum. Men íbáðum førum mugu hesir báðir polariseringsflokkar taka týðandi fet nærri miðjuni og seta konsensuspolitikkin fremst.

Hóast ein virðiligan leiðara í løgmanni, liggur Fólkaflokkurin, sum hann hevur reitt. Hann átti at vitað betur, tá hann legði seg í føvningin á Tjóðveldisfl. eftir síðsta val.Megnar Fólkafl. at sleppa heilskapaður úr valinum kann henda, at vit fáa eina tryflokkasamgongu millum A,B og C. Men tá krevst, at C er størstur fyri at fáa javnvág í høgravinstra. Smærri flokkarnir kunnu tó broyta alt hetta. A,B og C tykist at verða ein møguleiki, ið ikki skal útilokast. Tess nærri vit nærkast valinum tess nærri nærkast Tjóðveldisfl. síni oyðimarkagongd, nú leiðslan og strategar hennara leggja sjógv til allar aðrar flokkar. Vil hann í Tinganes má hann lata gomlu politikararnar blíva hoyrdar aftur í flokkinum. Teir, ið vilja samstarv og semju við aðrar. Valið verður tí eisini ein uppgerð innanhýsis í Tjóðveldisflokkinum. Ein sigur fyri sjálvrættvísu leiðsluna kann lættliga gerast ein ósigur fyri flokkin.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Kære Lars Emil Johansen

**Jóannes Eidesgaard**



Vi er aldeles ikke uenige om de politiske præmisser, der gør sig gældende, når man er medlem af Folketinget. Man er selvfølgelig først og fremmest ansvarlig over for sin egen samvittighed og over for de mennesker, der har valgt en.

Det kan absolut ikke betegnes for at gå efter manden i stedet for efter bolden, når man respekterer de interne ideoligiske uenigheder, der gør sig gældende både i Grønland og på Færøerne. Lige så lidt har det noget med censur eller med berøringsangst at gøre, men tværtimod handler det om det, man retfærdigvis kan betegne respektfuldt samarbejde. Det skal selvfølgelig ikke forveksles med fælles problemer, som det officielle Grønland og det officielle Færøerne har over for en tredie part f. ex. Danmark. Men i selvstændighedsprocessen har vi ikke nogen fælles front med en bred folkelig opbakning hverken internt her på Færøerne eller Færøerne og Grønland imellem.

Når du siger, at du vil være talerør for republikanerne på Færøerne, så har du faktiskt gjort dig til talsmand for et mindretal af færinger, der ønsker en selvstændighedsproces, som alene republikanerne står for. En proces, som faktisk har forhindret, at selvstændigheden på Færøerne har fået den brede folkelige tilslutning, den selvfølgelig burde have. Derfor er det for mig meget besynderligt, at du har gjort dig til netop dette partis talerør, da det hverken er oppositionens holdning, men så sandelig heller ikke den officielle færøske holdning - jævnfør lagmandens udtalelse her forleden i Lagtinget, hvor han siger, at den Nordatlantiske Gruppe på Christiansborg absolut ikke er talerør for landsstyrets politiske holdning. Desuden understregede lagmanden også, at han nu har anset det for nødvendigt at gøre begge de færøske medlemmer af Folketinget skriftligt bekendte med, at de ikke har mandat til at handle på landsstyrets vegne.

Det kan da ikke komme bag på dig som en erfaren parlamentariker, at selve emnet om udviklingen i den færøske selvstændighedsproces er et meget følsomt emne. Det vil blive en central del af den færøske valgkamp op til lagtingsvalget her om kort tid, hvor det forhåbenlig vil lykkkes for os at få såvel en bred politisk som en folkelig opbakning bag den videre proces i denne sag. Men først og fremmest er det en afgørelse, som den færøske befolkning uden hverken dansk eller grønlandsk deltagelse skal træffe den endelige beslutning om.

Det er hvad jeg har gjort opmærksom på i min skrivelse fra 18. des. i år.

Med venlig hilsen og med ønsket om et godt nytår.

# Um Teistan

**Sólvit Simonsen**



Eg haldi ikki at Eyðun Viderø átti at fara og andøva ímóti einari brúkiligari ferðaætlan til Sandoynna. Tað var fyri nøkrum árum síðani, eg koyrdi rusk, tá kemur ein maður til mín og biður meg taka ein posa eyka, hann stóð við pengum, at geva mær afturfyri, eg bað hann hava pengarnar og segði, at eg var nøgdur, um eg fekk takk afturfyri. Svarið var: »Tak pengarnar, tú livir ikki leingi av takk«. Hetta var ein av Eyðunsa partamonnum, sum nú liggur undir grønu torvu. So er tað eg má spyrja: skulu vit bara seta okkum hendur í favn og siga takk? Skulu vit eisini siga takk fyri aliloyvi, sum er lirkað okkum av hondum?

Annars haldi eg Sosialurin blæsur tað nokk so nógv upp við einari heilari fyrstu síðu um siglingina út í Hest. Har verður skrivað, at teir eru rættiliga skelkaðir av sandoyingum og Páll á Reynatúgvu. Tað haldi eg skuldi ikki verið nógv at verið skelkaður av, at ein tingmaður roynir at arbeiða fyri einari virðiligari ferðaætlan til sítt egna valdømi, eg haldi at vit eru meira skelkaði av teimum, sum ikki royna tað.

Eg hevði eitt uppskot til ferðaætlan, sum Páll broytti eitt sindur til tað betra.

Og sum hann sigur, tað má saktans bera til, at hestmenn koma fyrst til Skopunar á morgni, og vit fyrst út í Hest á kvøldi, havandi í huga, at í Hesti búgva 50 fólk og í Sandoynni búgva 1500 fólk, tá skuldi ikki verið órættvíst býti til fólkið í Hesti.

Hvussu Tróndur sigldi á eystfalli og landsynningi kann væl hava nakað við ferðaætlanina at gera, illveður kemur væl altíð at broyta rutuna runt landið.

Viðvíkjandi vinnulívinum her í oynni, so høvdu teir spart hópin av pengum, um ferðaætlanin bleiv løgd, sum skotið upp.

Annars ynski eg hestfólki, sandoyingum og øllum Føroya fólki eitt gott nýggjár.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




## VIÐMERKINGAR

# Arbeiðsgevarar og óskil á arbeiðsmarknaðinum

**Gunnleivur Dalsgarð**
*formaður í Starvsmannafelagnum*



**“Eggsjúkan” hjá almennu og privatu arbeiðsgevarasíðuni,at fáa sett donsku arbeiðsrættarskipanina í gildi her hjá okkum, er aftur farin at gera gera um seg.**

»Í 1989 tók spurningurin seg aftur upp av álvara, um at fáa sett á stovn donsku arbeiðsrættarskipanina, tá táverandi landsstýri setti arbeiðsbólk at fyrireika ein slíkan rætt og í 1990 legði nevndin (ikki samd) fram álit, men aftaná mestsum samfelt mótmæli frá fakfeløgunum, kom hetta ongantíð í tingið, -tað segðist, at landsstýrismaðurin vendi útaftur í Tinganes við tí, tá hann júst hevði passerað Rasmus Effersøe á Tinghúsvøllinum!

Men,- so aftur í januar 1998, vóru Óli Brekmann og Bjørn á Heygum (tingmenn)aftur uppá spæl og løgdu nýtt uppskot um danska arbeiðsrættin framm, - meinlíkt tí frá 1990.

Men aftur tóku fakfeløg seg saman og gjørdu greitt hvørja hugsan hesi høvdu til hendan danska arbeiðsrættin,og henda breiða mótstøðan gjørdi, at heldur ikki hesuferð eydnaðist at fáa ”hjartabarnið” uppá pláss,- uppskotið fór aftur í ”ommu sína”,- tá!

Í mars 1998 tók táverandi landsstýrismaður Óli Jacobsen stig til, at partarnir á arbeiðsmarknaðinum settu arbeiðsbólk, at gera eina skipan, sum kundi loysa trupuleikar og ósemjur, sum kundu stinga seg upp á arbeiðsmarknaðinum og sigast skal, at her var helst ætlanin, at partarnir á arbeiðsmaknaðinum í felag, sjálvir skuldu finna útav at gera eina skipan.

Bólkurin varð settur og hevði einstakan hissini fund, men so sovnaði hetta, - hví kann gitast um,- helst var tað tí at arbeiðsgevarasíðan ikki vildi ganga undir slíka mannagongd, men heldur vildi trýsta politiska myndugleikan, at løggeva fyri hesum!

Men fakfeløgini sóðu skriftina á vegginum frá talsfólkunum á arbeiðsgevarsíðuni,- bæði í landsstýri, tingið og uttanfyri - og tóku tí í mai 1998 stig til, at orða uppskot og royna seta á stovn VÍÐKAÐAN GERÐARRÆTT, sum feløgini valdu at kallað skipania.

Dúgliga varð arbeitt og uppskot varð gjørt, sum feløgini sum heild vóru samd um, og varð hetta sent bæði almennu og privatu arbeiðsgevarunum.

Hetta var í juni 1998, men stutt aftaná svarðaði samlaði arbeiðsgevaraskarin (í einum skrivi !), at tey tóku ikki undir við okkara ætlan um viðkaðan gerðarrætt, ml.a. tí at omanfyri nevndi arbeiðsbólkur hjá Óla Jacobsen sat og ARBEIDDI VIÐ MÁLINUM !!

Eisini førdu tey – arbeiðsgevararnir - fram, at tey vildu hava skipanina ásetta við løgtingslóg, ml.a. við tí grundgeving, at hetta skuldi tryggja, at hon fevndi um allan arbeiðsmarknaðin og sostatt var samlaður “innanfyri”.

Her skal viðmerkjast, at hægstarættardómur í Danmark hevur í 90unum staðfest, at arbeiðsrættarskipanin har, ikki fevnir um allan danska arbeiðsmarknaðin, so grundgevingin fyri at hann skal fevna um allan arbeiðsmarknaðin, heldur ikki kann nýtast í støðutakan teirra her.

Høvuðsorøkirnar hjá fakfeløgunum at vísa donsku skipanina við arbeiðsrætti frá sær, er at feløgini kunnu ikki og fara ikki at góðtaka, at hesin rættur fær heimildir at áleggja bót ella endurgjald og at avgerðin hjá slíkum rætti ikki kann kærast til hægri vanligan rætt,- fakfelagsviðurskiftir sum heild verða soleiðis “kriminaliseraði” á ein serligan hátt, uttanum almennu rættaskipanina!!

So grundleggjandi einføld er hendan støðutakan fakfelaganna !!

Skipanin, sum fakfeløgini skutu upp, hevur víðar heimildir til at finna SKJÓTAR loysnir á ósemjum og trupuleikum, sum taka seg upp á arbeiðsmarknaðinum, men hetta skuldi verða ein skipan, sum partarnir á arbeiðsmarknaðinum sjálvir skulu seta í verk í felag.

Tað verður ov drúgført her at taka alt uppskotið fram, men tað er tókt hjá øllum fakfeløgunum, sum vóru við í hesum arbeiði.

Tað átti og eigur at verði ØLLUM arbeiðsgevarum ,- almennum eins og privatum, - púra greitt, at fakfeløg fara ikki og vilja ikki ganga undir eina arbeiðsrættarskipan, sum hevur donsku skipanina sum fyrimynd,- her skal arbeiðsmarknaðurin sjálvur finna sítt egna støði!

Tað bæði undrar og ikki minni ørkymlar fakfeløgini, at øll arbeiðsgevarasíðan nú, stutt aftaná at nýggir sáttmálar eru undirskrivaðir, er farin undir at trýsta ætlanina við danska arbeiðsrættinum ígjøgnum, hetta hóast øll fakfeløg vísti hesum frá sær, tá almenni og privata arbeiðsgevarin royndi at fáa hetta í gjøgnum tá samráðingarnar byrjaðu seinasta vár.

At so Føroya Arbeiðsgevarafelag (FAG) mestsum hóttir og hóreiggjar sær við fútarættinum, fyri at fáa arbeiðsrættin ígjøgnum, er skelkandi og átaluvert!!,- forrestin, hvussu ber tað til, at FAG uppá forhond kann taka fútarættin inn sum eitt vápn her,- nøkur avtala ella ”forlovilsi” ella…. ?? Sambært formanninum í FAG, er tað bert av gloymsku, at hendan leiðin ikki hevur verið nýtt áður!! Men,- meira enn løgi er tað, at tað ber til hjá arbeiðsgevarunum, at mestsum misnýta fútarættin opinlýst til at trýsta arbeiðsrættin ígjøgnum, sum tey annars ikki hava megna á annan hátt.

Tað skal sláast fast, at fútarætturin ml.a. í trætuni millum Havnar arbeiðsmannafelg og Landssjúkrahúsið, bert viðgjørdu heimildina at leggja arbeiði niður, men ikki tað grundleggjandi um sáttmálabrotið. Og her tekur nakað grundleggjandi seg upp, um ”førleikan” hjá fútarættinum, at blanda seg uppí!

At fakfeløg hava rætt at reagera, tá arbeiðsgevarin brýtur sáttmálan, eigur ikki at vera nakar ivi, men nú er so fútarætturin blivið amboðið hjá arbeiðsgevarunum, at steðga hesum sjálvsagda rætti fakfeløganna! Og provokerandi leggur formaður FAG afturat, at teir fara ikki at halda seg aftur við at ganga hesa leiðina í framtíðini,- INNTIL ARBEIÐSRÆTTURIN ER KOMIN UPPÁ PLÁSS !!!

Men vit eiga ikki at lata okkum hetta lynda og eiga tí at brynja okkum í felag til stríð, at steðga hesum ágangi !!!

Niðurstøðan er, at fakfeløgini hava framvegis uppskotið um víðkaðan gerðarrætt á borðinum og grundgevingin frá arbeiðsgevarunum í 1998, ikki at kunna viðgera uppskot okkara, tí arbeiðsbólkur sat og arbeiddi við málinum, í hvussu so er ikki er til staðar og nøkur grundgeving í dag fyri ikki at viðgerða hetta uppskot okkara, - har er onki hent og arbeiðsbólkurin er ikki til longur í verki !

- at fáa fakfeløgini at ganga við til at seta arbeiðsrætt ml.a. eftir donsku mynstri í gildi her, kunnu arbeiðsgevarar - bæði almennir og privatir - gloyma alt um.
- at arbeiðsgevarar heldur eiga at nýta orkuna til, saman við okkum, at finna semjur og halda uppat við niðurbrótandi álopum á fakfeløgini, sum bert máar støði undan einum skilagóðum samstarvi!
- at hendan boðskapin hava vit tí bæði tann almenna og privata arbeiðsgevarin!

Okkara áheitan á ØLL fakfeløgini er, at vit í felag taka stig til, at steðga hesum áganginum frá arbeiðsgevarunum!!

# Viðmerkingar til Bill Justinussen »Tríggir lærarar úr Fuglafirði«

**Jóhan Heri Joensen**
*530 Fuglafjørður*

Í bløðunum 21.desembur hevði Bill Justinussen eina grein har hann við sera ljótum undirtóna viðger løgtingsmennirnar úr Fuglafirði.

Vanliga verða vit lærarar, glósaðir við arbeiði okkara, og hvat ein lærari kann brúkast til. Hettar verður sum oftast ikki tikið so tungt, tí í flestu førum er hettar ikki illa meint, og eigur tí eisini at verða uppfatað soleiðis, men táið Bill í greinini vil brúka hesar glósur sum óndsinnað skitið vápn uppundir sítt komandi valstríð, kann eg ikki annað enn gera veljarum hansara greitt, hvør muran í manninum er, sum til dagligt sigst hava várharra í sínum skjøldri. At tú ikki virðir lærarar meira enn tann lortin tú traðkar á er upp til tín. Tú kanst sum í skrivið tínum, avdúka, hvør veruligi persónurin er sum goymir seg aftan fríða skinnið, ella tú heldur roynir at liva upp til tann persón, tú sigur teg vera.

Bill hevur eisini heilt misfatað, hvørja uppgávu løgtingsmennirnir hava fyri landi og valdømi. Tað er ikki komunalval, sum stendur fyri durum, men eitt løgtingsval.

Bill sigur, at Skálafjørðurin ongan umdømisvaldan hevur á tingi. Alfred Olsen á Toftum er umdømisvaldur, men eftir tíni uppfatan, so er Toftir ikki partur av Skálafjørðinum.

Bill spyr. Hvussu nógv hava lærararnir í Fuglafirði hjálpt Skálafjørðinum seinastu 4 árini? Tú hevur óivað gloymt, at allir tríggir løgtingsmennirnir úr Fuglafirði, stuðlaðu og gjørdu at farleiðin millum Skálafjørðin og Havnina varð uppafturtikin. Ein farleið sum als ongan áhuga hevði millum fuglfirðingar. Annars er at siga, at teir eru valdir inn fyri alla Eysturoynna og ikki bert fyri Fuglafjørð og Runavík.

Eg kann eisini venda spurninginum. Hvussu nógv hava Torbjørn Jacobsen, Sámal Petur í Grund og Kári Højdaard gjørt fyri Fuglafjørð í sama tíðarskeiði???? Einki!!!

Eg skilji ikki at lokalpatriotisku polittikararnir úr Runavík loypa upp á báum beinum tí fyrispurningur verður settur um bergholsgerina Kambsdalur - Millum Fjara. Tit hava sum so ikki brúk fyri hesum tunli, so eg skilji ikki tykkara mótstøðu, fyri framburði aðrastaðni í oynni. Tú fert at bjóða teg fram sum polittikari fyri alla oynna, so strangt tikið kundi tú í minsta lagi verið líkaglaður. At tunnilin so eisini er ein skilagóð búskaparlig íløga er ein onnur søk. Ein landspolittikari sum, í egnum valdømi, mótarbeiðir eini búskaparliga skilagóðari íløgu av reint lokalpatriotiskum grundum, er ikki verdur at sita á tingi og stýra landi okkara. Hettar eiga veljararnir so avgjørt at leggja sær í geyma.

Eg vildi helst, at orðafellið: „Ger skálkinum gott, hann lønir tær aftur við há og spott“, ikki varð partur í tí samarbeiði sum helst skuldi verið í økinum. Men aftur og aftur gerist eg, tíverri, bert meira sannførdur um at hettar heldur er reglan enn undantakið. Hesi álop kunnu bert skiljast sum, at tit meina at Eysturoyggin einans er strekkið Toftavatn – Lambareiði.